# OTTA GO!«

flytir seg ígjøgnum 10 originalar sangir, sum skifta millum tað stilla og innarliga, og tað meir útfarandi og tempofylta. Í Føroyum hevur fløgan fingið góð ummæli og er spæld nógv í útvarpinum. Serliga hava ummælarar róst bólkinum fyri teirra autentiska úttrykk.

Klaus Rydahl, mentanarjournalistur á donsku útvarpsrásini P1, var komin á Jolene fyri at gera eitt innslag hetta kvøldið til sendingina »Kulturnyt«. Rydahl segði m.a., at tað, hann helt vera spennandi við bólkinum var, at tað tóktist, sum The Reverends hevði valt ikki at taka arvin eftir country upp, og so føra hann víðari, sum ein ofta sær í teim modernaðu countrybólkunum, har genran aloftast verður førd víðari út í alternativan country, har hon verður blandað við t. d. punk, rock, fólkatónleiki osfr. Rydahl helt harafturímóti, at tað var spennandi at síggja ein bólk, ið nærum tóktist at halda seg til reindyrkaðu country klichéina, bæði í løgum og orðum. Harumframt helt hann tað vera sera spennandi, at føroyingar valdu at spæla country. Hann setti síðan spurningin, hvat tað er fyri ein styrki, ið liggur í countrytónleikinum og hvat er tað við honum, ið dregur? Hvat er tað hetta slagið av tónleiki er ført fyri? Tí er samband ímillum Føroyar, ið oftast verður sett í samband við fisk og illfýsið veður, tunnellir og blokkstuðul og so amerikanskan country?

The Reverends hava verið í Føroyum og spælt fleiri konsertir, og her kom fløgan út longu í september. Men nú halda teir, at tíðin er komin til at fevna breiðri, og av álvara satsa upp á útheimin. Ætlanin við hesi altjóða útgávugildinum er tí sambært Niclasi Torsteinssyni, sangara í The Reverends, at fáa fløguna og navnið hjá bólkinum út í Danmark og í restini av heiminum.

- Við at hava tiltakið á Jolene vænta vit eina aðra áhoyrarafjøld enn hana, vit vanliga hava, og á henda hátt røkka vit breiðri sigur Niklas.

- Jolene er eitt kent stað, har nógv ymisk folk vitja. Nógvir føroyingar hava spælt her fyrr, og staðið var tí upplagt. Ikki minst er staðið industrielt, undirgrund og cool, og hóskar tí væl til okkara tónleik og til okkara stíl. Allir liminir í bólkinum eru føddir og uppvaksnir í Føroyum, men eru búsitandi í Keypmanahavn og Svøríki. Skiftið frá Føroyum til stórbýin avspeglast í tónleikinum, við at countrytónleikurin verður blandaður við tí urbana, við pørtum av bluegrass og southernrokki. Sjálvir kalla teir tónleikin norðurlendskan americana.



Niklas greiður frá, at hann ikki sær hesa altjóða útgávu sum eitt beinleiðis gjøgnumbrot.

– Eg síggi hetta heldur sum byrjanina á eina longri ferð, har vit fara at geva fleiri fløgur út, peila av, kanna, hvar vit eru á veg. Hetta er tað, eg syngi í sanginum You gotta go, har eg m.a. sigi: Hey you just keep on going/Cause you never can go back, sigur Niklas og sær øgiliga álvasamur út... eina løtu.

Tekstirnir á fløguni, ið flestir eru skrivaðir av Niklasi, sum fleiri ferðir hevur verið í USA, har kærleikin til country tónleikin byrjaði at spenna vítt. Tað sama er galdandi fyri løgini á fløguni, ið tí fyri mong kann tykjast eitt sindur spjødd. Ikki tí, hetta er eisini ein styrki, tí tað hevur við sær, at ein sum lurtari alla tíðina er noyddur at fyrihalda seg til tónleikin, tí hann er so skiftandi. Fløgan sum heild gerst tí ikki ein monoton uppliving, men heldur ein mynd av ymiskum tempo og stemningum og kenslum, sum eisini kemur til sjóndar í tí lyriska partinum av fløguni.

Tekstinir, ið eru sera vælskrivaðir og áhugaverdir, snúgva seg um alt frá kvinnum, til hjartasorg, drukktúrum til meira djúpar ferðir inn í menniskjaligu sálina. Evni sum nútímans menniskja og gerandisdagurin, og tað at sleppa leysur av fortíðini eru eisini at finna á fløguni. Lagið, You gotta go, leggur tí upp til, at ein er noyddur at halda á fram, tí fortíðin er farin og kann ikki broytast. Tað sama er galdandi fyri lagið Walking backwards, ið snýr seg um at halda fast í einum ólukkuligum forelskilsi í fortíðini. Munurin millum stórbýin og tað lítla landið, larmurin frá býnum og náttúran avspeglast eisini í tekstunum.

Sum sipað verður til í tíðindaskrivinum hjá bólkinum, fer ein ofta at hugsa um beat-ættarliðið, og høvundan Jack Kerouac. Serliga í mun til teir tekstir, ið snúgva seg um at vera á veg. Ikki bert í mun til tí fysisku ferðina frá bygd til bý, men ikki minst í mun til tí spirituellu ferðina og vitanina um, at vit øll skulu her frá ein dag, og at ein tí eigur at fevna lívið og liva, meðan ein er livandi. Tað verður við ørðum orðum lagt upp til at finna gleðina í núinum og dirvi til at hyggja og flyta seg fram eftir í lívinum, og ikki vera bangin fyri at tora at velja.

Hetta kvøldið, spældi bólkurin sjey løg. Løgini teir høvdu valt var spæla vístu bæði á, hvat fløgan hevur at bjóða, men eisini, hvat hvør einstakur limur í bólkinum megnar.

Allir liminir fingu pláss at útfolda seg, og hetta var gjørt á ein undirhaldandi hátt við eksperimenterandi guitarsoloum, passagum, har sangarin vísti sítt stóra virði, og ikki minst kóreginleikararnar hjá Janusi og Jens, sum skapti stóra frøi millum áhoyrararnar og ikki minst hjá tónleikarunum.

Repetoaríð var væl samansett av





stillum og meir skjótum løgum, har teir komu allan vegin runt. Fimm av løgunum, teir spældu hetta kvøldið, vóru av fløguni. Harafturat spældu teir eitt coverlag av W.K. Duff, The path familiar og eitt gamalt Mold lag, I don´t know what´s going on, sum altíð er ein succes við sínum fangandi lagi og stuttliga teksti.

Eftir konsertina segði barrvørðurin og altmuligmaðurin á Jolene, íslendingurin Gunni, at hetta hevði verið ein góð uppliving, og at hann vónaði, at countrytónleikur fór at vera meir at hoyra á Jolene í framtíðini. Tá eg bað hann lýsa konsertina við trimum orðum segði hann: kærleiki, relaxed og samhoyring.

- Og ja, hetta vóru væl vald orð til at lýsa eitt kvøld, har tónleikurin og The Reverends megnaðu at vísa, hvat country er ført fyri at prædika uttan at vera leiðbeinandi.

*post@sosialurin.fo*

*Myndir: Bjarni Lamhauge*